1,5 mia. goldnar í inntøkuskattum higartil í ár

Ein fyribilsuppgerð fyri 10 teir fyrstu mánaðirnar í ár visur, at skattainntøkan er økt við 118 mió. kr. í mun til somu tíð í fjør og tað restar nú lítið í at metið frá 1989 verður sligið

ELI GUTTESEN

Føroyski búskapurin koyrir við fullum snúningum í løtuni.

Løngjaldingarnar, sum ofta verða bruktar sum mat fyri búskapargongdini, økjast dag fyri dag og hetta merkist eisini á skattainntøkunum.

Sambært eini fyribilsuppgerð, sum Hagstovan hevur gjørt við taltilfari fra Toll- og Skattstovuni, hava vit goldið 1.506 mió. kr. í inntøkuskatti fimm teir fyrstu mánaðirnar í ár.

Lita vit aftur í tíðina og samanbera við undanfarin ár sæst, at talan er um ein vokstur upp á 118 mió. kr. í mun til somu tíð í fjør ella ein lutfalsligan vokstur upp á 8,5 prosent.

Í mun til 1997 er talan um eina øking upp á heili 213 mió. kr. ella ein lutfalsligan vokstur upp á 16,5 prosent.

Hetta er alt goldin A- og B-skattur við skattalíknandi gjøldum so sum arbeiðsmarknaðareftirlønargjaldi og gjaldi til arbeiðsloysisskipanina.

Hóast løngjaldingarnar innan fiskiskap eru minkaðar nakað samstundis sum fiskimenn nú rinda lutfalsliga minni í skatti, so vísa skattatøl kortini, at vit eru um at sláa 10 ára gamla inntøkuskattametið frá 1989 (tilvildarlig arkivmynd)

Reinsa vit skattatalið upp á 1.506 mió. kr. fyri tær 69 mió. kr., sum eru goldnar inn til arbeiðsloysisskipanina og tær 19 mió. kr., sum eru goldnar inn í arbeiðsmarknaðargjaldi eru sambært Hagstovuni 1.419 mió. kr. eftir.

Hetta er at goldin A- og B-skattur og skattalíknandi gjøldum so sum arbeiðsmarknaðargjaldi og gjaldi til arbeiðsmarknaðargjaldi eru farin við einum lutfalsligum parti meðan kommununar og arbeiðsmarknaðargjaldini eru farin við einum lutfalsliga minni parti.

Landið hevur nevniliga fingið 49,2 prosent av skattakøkuni í ár ella 1,8 prosent stig meira enn fyri einum ári síðani.

Kommununar partur hevur verið 45 prosent ella gott eitt prosent-stig minni enn fyri einum ári síðani.

Arbeiðsmarknaðargjaldini eru farin við 5,8 prosentum av skattakøkuni og er hetta 0,8 prosent stig minni enn fyri einum ári síðani.

Eg ein stóran - tú ein lítlan ...

Sum áður sagt, so er inntøkuskatturin við arbeiðsmarknaðargjaldum øktur 8,5 prosent í mun til somu tíð í fjør, men av tí at býtið av skattakøkuni hevur verið heldur ørvisi í ár enn í fjør hevur landið fingið tvifalt so stóran vokstur sum kommununar.

Meðan skattainntøkurnar hjá kommununum eru øktar við 6,1 prosentum eru skattainntøkurnar hjá landskassanum øktar við 12,5 prosentum.

Tilsamans eru hesar øktar við 9,3 prosentum. Hinvegin eru arbeiðsmarknaðargjøldini minkaði við um 2 prosentum og hetta ger, at vøksturin í inntøkuskattinum er 8,5 prosent.

Landið størri part

Hyggja vit eftir prosentvísa býtinum av skattakøkuni so er landið farið við einum lutfalsliga størri parti enn kommununar og arbeiðsmarknaðargjaldini eru farin við einum lutfalsliga minni parti.

Landið hevur nevniliga fingið 49,2 prosent av skattakøkuni í ár ella 1,8 prosent stig meira enn fyri einum ári síðani.

Kommununar partur hevur verið 45 prosent ella gott eitt prosent-stig minni enn fyri einum ári síðani.

Arbeiðsmarknaðargjaldini eru farin við 5,8 prosentum av skattakøkuni og er hetta 0,8 prosent stig minni enn fyri einum ári síðani.

Hetta er alt goldin A- og B-skattur við skattalíknandi gjøldum so sum arbeiðsmarknaðargjaldi og gjaldi til arbeiðsmarknaðareftirlønargjaldi eru sambært Hagstovuni 1.419 mió. kr. eftir.

Hetta er tað, sum samanlagt er goldið í lands- og kommunuskatti og upphæddin er 121 mió. kr. hægri enn somu tíð í fjør ella bert eitt lítið vet niðan fyri upphæddina frá okt. í 1989, sum enn eigur metið.

Kommununar partur av skattinum var 678 mió. kr. meðan landsins partur var 741 mió. kr.

Í mun til somu tíð í fjør er kommununar partur øktur við 39 mió. kr. meðan landsins partur er øktur við 82 mió. kr.

Arbeiðsmarknaðargjøldi eru vóru 90 mió. kr. fyrstu tiggju mánaðirnar í fjør hava sama tíðarskeið í ár verið 88 mió. kr. ella um tvær mió. kr. minni enn í fjør.

Viðmerkjast skal at avrundingar órógva tølini nakað.

Studulin minkar

Tá alt kemur til alt, eru tær 1.419 mió. kr., sum komnar eru inn í skatti fyrstu tiggju mánaðirnar í ár ikki heilt reinur skattur kortini.

Ein partur av hesum peningi verður nevniliga utafturgoldin sum rentustuðul.

Fyribilsuppgerðin visur, at kommununar skuldu av við 28 mió. kr. í rentustuðuli, meðan landið skuldi av við 61 mió. kr., tvs. meira enn tvifalt so nógv.

Lutfalsliga var hetta í báðum føroum 6,5 prosent minni enn somu tíð í fjør og er hetta tekin um at sethúsaskuldin minkar.

Orsøkin til, at Hagstovan hevur valt at lata rentustuðulin hanga uppi í skattatølunum er fyri at kunnu samanbera skattatølini við gomul ár, tá vit ikki høvdu rentustuðul men rentufradratt í skattinum.

Halda vit hinvegin rentustuðlinum uttanfyri hava kommununar fingið 650 mió. kr. í skattainntøkum meðan landið hevur fingið 680 mió. kr.

Nú hava kommununar sløk 49 prosent av skattinum meðan landið hevur goð 51 prosent.

Tøku vit ikki hædd fyri stuðlinum vildið bytið verið 48 prosent til kommununar og 52 til landið og munurin vildi verið tvifalt so stórur.

Sjálvtøkuborð í Runavík

Leygardagin og sunnudagin skipar Runavíkar Sjómansheim fyri stórum sjálvtøkuborði, har tann íslendski kokkurin Hilmar B. Jónson fer at borðreiða við alskyns fiska- og kjøtrættum.

Hilmar B. Jónson hevur drúgvar royndir innan sitt yrki og hevur millum annað verið kokkur á teimum stórstu hotellunum í Íslandi, samstundis sum hann hevur verið gestakokkur hjá íslendska forsetanum í 12 ár.

Hóvið verður at bileggja sær borð, og eftir áhuganum at døma gerst hetta ikki ov skjótt. Umframt fiska- og kjøtrættir verður eisini okkurt leskiligt omanfyri.

Stjórin á Runavíkar Sjómansheimi, Jeffri Johannesen, sigur, at tiltakið er ein royndur at skapa nakað nýtt í økinum, og hann vónar, at væl verður tikið imóti.

Runavíkar Sjómansheim skipar annars hvørt vikuskifti fram til jóla fyri stórum jóla- og sjálvtøkuborði.

Jólatiltøk hjá skótunum í Fuglafirði

I desember verður eitt samatjald sett upp í miðbýnum

Arliga sølutiltakið hjá KFUM- og KFUK-skótunum í Fuglafirði verður nu sunnudagin í skótahúsunum kl. 4 sp.

Har verður ymiskt at vinna í jólaspæli, við lutaseðlum og kokutombola.

Jólamaðurin vitjar, og vinnast kunnu 3 forkunnugir jólakalendarar.

Okeypis drekkamunnur og saft við onkrum góðum heimabakstri aftanvið verður at fáa okeypis til tey, sum koma á gátt.

Um veðrið verður tí vildar í desember, fara skótarnir at seta upp eitt sama-tjald, eina KAVO, í miðbýnum, har teir fara at gera ymiskt skótaarbeiði, meðan teim vitjandi verður boði ein fløva og blíðskap fyri at koma í rættan jólahyr, siga skótarnir í Fuglafirði.

Endurstovna Móðurmálslærarafelagið

Seinastu árini hevur Móðurmálslærarafelagið ligið í dvala, men nú hava lærarar, sum undirvísa í føroyskum, tikið sær um reiggj og fara at endurstovna felagið.

Felagið er bæði fyri lærarar í fólkaskulanum og í hægri skulum.

Endurstovnandi aðalfundurin verður leygardagin kl. 15 í Norðurlandahúsinum.

Flestu feløg dragast við tann trupulleika, at fáir limir møta til aðalfundir, men fyri at lokka móðurmálslærarar til Havnar, byrjar aðalfundurin við pallborðsfundi, har evnið er malið í fjølmiðlunum.

Við pallborðið fara at sita, Bergljót Hentze, studentaskulalærari, Jógvan í Lon a Fór-oyamálsdeildini og formaður í málnevndini, Randi Jacobsen, Føroya Blaðmannafelag og Ivan Niclasen, Sjónvarp Føroya.

Dansistevna í Havn

Dansifeløgini hittast til stevnu í mai næsta ár

Av eini løgnari misskiljing boru vit í gjár tey tíðindi fra Dansigaman, at stóra dansistevnan, sum verður hildin annaðhvørt ár, skuldi verða í Trongisvági í apríl komandi ár.

Hetta er ikki so. Dansistevnan ár 2000 verður hildin í Havn 13. mai, og er tað Dansifrøi, sum skipa skal fyri hesum stóra tiltaki. Blstj.

Fleiri siðamisbrot verða avdúkað

Bæði løgreglan og Almannastovan vátta, at fleiri fráboðanir eru av siðamisbrotum móti børnum enn áður. Ein orsøk er helst, at fólk, sum eru um børnini, duga betur at siggja á teimum, at okkurt er heilt galið

INGI RASMUSSEN

– Tendensurin er greiður. Tað verða fráboðað fleiri mál um siðamisbrot móti børnum enn áður, sigur Bergleif Brimvík, leiðari á kriminaldeildini hjá løgregluni.

Heilir triggir persónar sita í løtuni varðhaldsfongslaðir undir illgruna fyri kynsligan ágang móti børnum. Løgreglan kannar málini undir afturlæstum hurðum, og fær tí einki sagt um, hvat tey snúgva seg um, ella hvussu nógv brót talan er um.

Keðiliga rákið, sum sæst aðrastaðni, er sostatt eisini farið at siggjast í Føroyum. Fleiri og fleiri mál koma undan kavi, har vaksin eru farin um mark við verjuleysum børnum. Men tað er ikki vist, at tað er tí, at fleiri gera seg inn á børn enn fyrr. Tað er líka sannlíkt, at avvarðandi duga betur at lesa børnini av.

Hagtølini hjá løgregluni progva vokstur í fráboðaðu siðamisbrotunum. Í 1998 voru seks skuldsetingar, í 1997 voru triggjar og í 1996 voru fýra skuldsetingar um siðamisbrot móti børnum. Arini frammanundan eru bara einstøk mál komin undan kavi.

– Hetta hevur vundið upp á seg. Men tað kann vera tilvildarligt. Tað kann eisini koma av, at mál av hesum slag hava verið meiri frammi. Fyrilestrar hava verið hildnir, og sendingar hava verið í sjónvarpinum. Fólk í dag vita meir um hetta og halda ikki upplýsingum aftur, sigur Bergleif Brimvík.

Men revsimálini eru bert toppurin av isfjallinum. Í grannalondum verður roknað við, at næstan tiggu prosent av børnum hava upplivað okkurt slag av kynsligari misnýtslu minst eina ferð.

Eitt er, at fleiri siðamisbrot føra til løgreglumál. Samstundis vitna fólk, at ein greiður vokstur er í fráboðanum, sum ikki siggjast aftur í hagtølunum, tí ikki øll føra til revsimál.

Almannastovan er millum teir stovnar, sum hevur fingið meiri at gera á økinum.

– Hetta er nakað vit møta oftari og oftari, sigur Eyðvør Mortensen, sum er leiðari á Forsorgardeildini í Havn.

Forsorgardeildirnar í Havn og Eysturoynni raðgeva teimum barnavernd-unum kring landið, sum ikki eru í Havn og Klaksvík, har tær eru sjálvstøð-ugar.

– Nógv meiri kemur fram enn áður. Vit siggja týðiliga, at fylgt verður betur við atferðini hjá børnunum. Fólk og stovnar hava betri innlit í gerandisdagin hjá teimum og duga betur at siggja trupulleikarnar, sigur Eyðvør Mortensen.

Modellmynd: Fleiri og fleiri mál um kynsliga misnýtslu av børnum koma undan kavi

Oljutreytirnar taka hædd fyri báðum pørtum

Fyri nokrum døgum síðani varð uppskotið til oljutreytir lagt fyri landsstýrið. Eyðun Elttør, oljumálaráðharri, metir, at treytirnar taka hædd fyri bæði oljufeløgum og landsins náttúrurikidømi

LEIF LAADAL

Aðrenn eitt samfelag er farið í holt við at utvinna olju, eru nógvir áhugabólkar, sum hála í hvør sína ætt. Í føroyska lørnum hava tað verið oljufeløgm, sum hava royndt at gjørt vart við, at verða treytirnar alt ov harðar, er vandi fyri, at tey fara at halda seg burturi. Samstundis gera bæði politikarar og fakfólk vart við, at møguleg olja í føroysku undirgrundini ikki eigur at verða kastað nærum ókeypis í fangið á teimum stóru feløgunum.

Í uppskotinum til oljutreytir, sum væntandi verður lagt fyri løgtingið fyrst í næstu viku, verður hædd tikin fyri báðum hesum sjónarmiðum, sigur Eyðun Elttør, oljumálaráðharri.

Hann vil ikki siga so nógv um beinleiðis innihaldið í oljutreytunum, men hann avdúkar tó so mikið, at talan verður um eitt eitt slag av framleiðslugaldi ella royalty, sum tað verður ropt aðrastaðni.

Fleiri sløg av avgjøldum

Í Caragata-alitinum stóð óbeinleiðis at lesa, at oljufeløgini ikki eru nakrir sunnudagsskuladreingir, sum einki annað ætla enn at hjalpa Føroyum so nógv sum til ber. Talan er um handilsfólk við stórum H, og hetta mugu føroyingar sær, at okkurt verður lagt á kistubotnin. Hvussu stórt framleiðslugaldið verður, tað fer løgtingið at vita í næstu viku og harvið eisini almenningurin, men Sjónvarp Føroya vísti longu tyskvøldið at siga, at gjaldið verður 2%. Hetta tal vil Eyðun Elttør hvørki vatta ella avsanna.

Eyðun Elttør metir, at treytirnar í sambandi við eina komandi oljuvinnu við Føroyar, sum verða lagdar fyri tingið í næstu viku, lúka bæði krøv og ynskir frá vinnuni, politikarum og fakfólki

Í uppskotinum til oljutreytir verða fleiri sløg av avgjøldum. Eitt nu viddargjøld og umsoknargjøld. Tað er longu greitt, at vørur og tænastur í eini møguligari komandi oljuvinnu í Føroyum skulu um føroyskan brúgvarkant. Hetta sigur kolvetnislogin beinleiðis, so samanumtikið má sigast, at talan verður um oljutreytir, sum bera bráð av ynskjunum hjá bæði framleiðarum, politikarum og fakfólkum.

Kunnu broytast

Tær treytir, sum í næstu viku koma fyri í løgtinginum, eru tær, ið skulu lukast í hesum fyrsta útbjóðingarumfarinum í Føroyum. Eyðun Elttør sigur, at hesar treytir verða ikki broyttar. Tey feløg, sum fáa loyvi at bora og utvinna í fyrsta umfari, sleppa, um man so kann siga, at arbeiðu í friði við teimum treytum, sum voru, tá ið tey søktu.

Tað er tó ikki óhugsandi, at treytirnar verða broyttar, tá boðið verður út aftur eina ferð í framtíðini. Eyðun Elttør sigur, at núverandi treytir eru gjørdar við tí fyri eyga, at tað ikki er staðfest enn, um olja er í føroyska undirgrundini, sum tað loysir seg at fara eftir.

– Hendir tað, at oljuvinnan við Føroyar verður stór, so er tað als ikki óhugsandi, at treytirnar til næsta útbjóðingarumfar verða ørvisi enn hesar, sum eg nú leggi fyri tingið, sigur Eyðun Elttør, oljumálaráðharri.